# HEIMSMÁLINI

## fyri burðardyggari menning

1 EINKI FÁTÆKADØMI

2 EINGIN HUNGUR

3 GÓÐ HEILSA OG VÆLFERÐ

4 DYGDARGÓÐ ÚTBÚGVING

5 JAVNSTØÐA MILLUM KYN

6 REINT VATN OG REINFØRI

7 BURÐARDYGG ORKA

8 SØMILIGT ARBEIÐI OG BÚSKAPARVØKSTUR

9 VINNA, NÝSKAPAN OG UNDIRSTØÐUKERVI

10 MINNI ÓJAVNI

11 BURÐARDYGGIR BÝIR OG BÝLINGAR

12 ÁBYRGDARFULL NÝTSLA OG FRAMLEIÐSLA

13 VEÐURLAGSÁTØK

14 LÍV Í HAVI

15 LÍV Á LANDI

16 FRIÐUR, RÆTTVÍSI OG STERKIR STOVNAR

17 SAMSTARV UM HEIMSMÁLINI

starvsfelagið

HEIMSMÁLINI
fyri burðardyggari menning

# Frá 2015 til 2030

Í 2015 heitir ST á heimsins tjóðir um at virka fyri at fremja 17 burðardygg menningarmál.

Málini eru sett fyri tíðarskeiðið 2015 til 2030, og skulu seta eina greiða kós fram ímóti burðardyggari menning til gagns fyri bæði menniskju og náttúru.

Endamálið er, at hvørt landið tekur útgangsstøði í egnum veruleikum og við egnum raðfestingum virkar fyri at fremja málini.

Landsstýrið tekur undir við Heimsmálunum og heitti á stovnar og felagsskapir at gera tað sama.

Nevndin í Starvsfelagnum hevur samtykt at taka undir við Heimsmálunum.

starvsfelagið

# Heimsmál 1 og 2







Í mun til málini at enda fátækradømi og hungri, veitir Starvsfelagið stuðul til hjálparfelagsskapir, t.d. Barnabata og Reyða Kross, sum arbeiða bæði í Føroyum og úti í heimi. Starvsfelagið hevur eisini verið við til at stovnað ALS, sum er ein týdningarmikil sosial trygdarskipan.

# Heimsmál 3




Í mun til málið at tryggja eitt heilsugott lív og trivnað, stuðla vit verkætlanum hjá Lions Club at fyribyrgja rúsevnimisnýtslu, sum er eitt gott og gevandi átak fyri trivnað hjá føroyskum ungdómi.

starvsfelagið

# Heimsmál 4

Í mun til málið um útbúgving og læringarmøguleikum, hava vit umboð í yrkisútbúgvingarráðnum og depilsráðum, har vit hava arbeitt fyri, at tað kunnu bjóðast fleiri útbúgvingar til ung og vaksin.
Ráðini tryggja eisini, at útbúgvingarumstøðurnar (t.d. á læruplássunum) eru nøktandi. Harumframt vóru vit við í slóðbrótandi trípartasamstarvi um at lyfta yrkisútbúgvingar, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum saman við politisku skipanini undirskrivað í 2019.

# Heimsmál 5

Í mun til málið um javnstøðu, hava vit havt umboð í Javnstøðunevndini og Demokratia í nógv ár, sum arbeiðir við javnstøðu á arbeiðsmarknaðinum og í politikki.
Í dagliga virkinum hjá felagnum verður javnstøða altíð tikin við, t.d. tá fyrilestrahaldarar og undirvísarar til tiltøk og skeið skulu veljast.

Vit hava harumframt ávirkað politiskt, at pensjónsgjald úr LÍV skal vera eins fyri kvinnur og menn.

starvsfelagið

# Heimsmál 7, 12 og 13

Í mun til málini um burðardygga orku, nýtslu- og framleiðslumynstur og veðurlagsbroytingar, hevur felagið seinastu tíðina arbeitt miðvíst við at flyta okkum meira á grønu kósina. Vit hava júst lagt um til grøna orku við sólpanelum og grøna hitaskipan við luft til vatn.

Vit hava innført grønan innkeypspolitikk, endurnýtslu- og rusksorteringspolitikk.

Vit hava harumframt avtalu í altjóða samstarvsfelagsskapum um burðardygd í øllum felags átøkum og tiltøkum.




starvsfelagið

# Heimsmál 8




Í mun til málið um sømiligt arbeiði til øll, hevur Starvsfelagið ein avgerandi leiklut í at verja og tryggja løntakarar. Hetta umfatar m.a.:

- Vit gera sáttmálar, sum verja rættindi hjá løntakarum.
- Vit eru vakthundar á økinum fyri at tryggja, at sáttmálar verða hildnir.
- Arbeiða politiskt at menna lógarverk til løntakarar at frama.
- Vit virka fyri tryggum arbeiðsumhvørvi, harundir sálarligt arbeiðsumhvørvi, m.a. við at seta sjóneykuna á happing.
- Vit syrgja fyri góðum, kollektivum tryggingum til okkara limir og eftirløn.

starvsfelagið

# Heimsmál 8.8

8 SØMILIGT ARBEIÐI OG BÚSKAPAR-VØKSTUR

*"Rættindi arbeiðstakaranna skulu verjast, og virkað verður fyri einum tryggum og støðugum arbeiðsumhvørvi fyri allar arbeiðstakarar, eisini gestaarbeiðarar, serliga kvinnuligar gestaarbeiðarar og tey, sum virka undir ótryggum arbeiðskorum"*

Við atliti til hetta málið hava vit valt at kanna hjá limum, hvussu talgilding hevur ávirkað arbeiðsumhvørvið hjá okkara limum, hevur talgildingin broytt størv, hava limirnir varðveitt tryggleikan í sínum størvum, ella eru teirra rættindi hótt uppá nakran máta. Vit hava givið svarfreist til 15. september at svara okkum uppá hetta.

starvsfelagið

# Heimsmál 10




Í mun til málið um at minka ójavnað í londum, leggja vit m.a. dent á at:

- arbeiða fyri lyfta láglønarbólkar.
- arbeiða fyri líka løn fyri líka arbeiði, óansæð kyn, upprunað, brek o.s.fr.
- arbeiða áhaldandi við politisku skipanini fyri at seta mismunalóggávu í verk á arbeiðsmarknaðinum, havi ikki nátt málinum enn.
- sáttmálin og lønartalvan eru til frama fyri javnað í mun til løn.

# Heimsmál 11




Í mun til málið um at gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar, hava vit leingi havt ynski um at arbeiða fyri einum meira rúmligum bústaðarmarknaði í Føroyum. Tí fegnast vit um, at vit saman við LÍV, har okkara limir hava sína eftirlønaruppsparing, arbeiða við at byggja leiguíbúðir.

starvsfelagið

starvsfelagið